# Vísið náði .......

BJARNI DJURHOLM
løgtingsmaður



**Landsstýrið skal taka støði í veruliguføroyum í stríðnum at varðveita vælferðarføroyar**

Fremsta uppgávan hjá politikarum er at tryggja, at allir borgarar hava mannsømilig kor, frá vøggu í grøv. Tað er eisini skylda hjá øllum, sum hava evnir og møguleikar at hjálpa, har tørvur er á.

Í framkomnum samfeløgum, har umfordeilingin treytar partar av vælferðini, er tað tí skylda hjá skiftandi stjórnum at taka hond um tey veikastu. Umstøðurnar hjá øllum samfelagsbólkum speglar hvørjum samfelag vit liva í. Og har eiga vit at ganga undan.

Í strembanini at røkka hesum máli eigur politiski myndugleikin tó ongantíð at missa úr eygsjón at loyva øllum at virka við sínum íbornu evnum. At gera tað lokkandi at arbeiða. Tá verður ríkiligt til øll.

Hesin politikkur hevur eyðkent bæði hesa og undanfarnu ABC-samgongu. Skattalættarnir, sum munaðu hjá teimum skattligu trongdu í inntøkubólkunum millum 170.000 og 270.000 kr, saman við eini søguligari útbygging av Samhaldsfasta, har pensionistar fingu upp til 37% meira í pensiónsútgjaldi, er besta prógvið um skilagóðan umfordeilings politikk.

Kortini er einki fullkomið. Tí vera tað altíð nøkur, sum ikki njóta fullan ágóða av førda politikkinum. Hetta er avbjóðing, sum ábyrgdarfullir politikarar sjálvsagt taka sær av. Avbjóðing, sum krevur dirvi og visiónir, nú vit eru í stórstu búskaparkreppu í mannaminni. Og avgerðin er tikin. Landið spílar seg út at fíggja milliarda undirskot fyri at halda fast um flestu vælferðartænasturnar, sum bert fyri fáum árum síðani vóru dreymar.

**Vit hoyra...**
Tað er tí møtimikið, at miðlarnir nú eyðmerkja landsstýri og løgting at forkoma vælferðarføroyum.

Vísið náði ..., sigur Sosialurin við tekstum til myndarøð av elendigheit, har politiska skipanin fær av at vita. Men lýsir blaðið allan veruleikan?

Kaga vit í fíggjarlógirnar farnu árini og taka nøkur tøl burtur úr rúgvini, sum fata um myndarøðina í blaðnum, kunnu vit konstatera:

- At Landsjúkrahúsið frá 2006 til 2008 hevði eini játtanarøking uppá 20%. Játtanin fyri 2009 (incl. eykajáttan) er økt 4,3%.
- At serviðgerð uttanlands frá 2006 til 2008 hevði eina játtanarøking uppá heili 29%. Fyri 2009 javnvigar játtanin við 2008 (incl. eykajáttan).
- At børn og ung frá 2006 til 2008 hevði eina játtanarøking uppá 16%. Í 2009 javnvigar játtanin við 2008 (incl. eykajáttan) .
- At barnatænastan frá 2006 til við 2008 hevði eina játtanarøking uppá 20%. Játtanin fyri 2009 er á leið tann sama sum í 2008.
- At stuðulstænastan fyri vaksin frá 2006 til 2008 hevði eina játtanarøking uppá heili 46%, og at játtanin fyri 2009 er á leið tann sama sum í 2008.
- At meirútreiðslur fyri brekað børn frá 2004 til 2008 hevði eina játtanarøking uppá 28%. Játtanin fyri 2009 øktist 6%.
- At hjálparamboð, herundir heilivágur, hoyritól o.a. frá 2006 til 2008 hevði eina rakstrarøking uppá 18%. Játtanin fyri 2009 er áleið tann sama sum fyri 2008.

**Veruliguføroyar**
Tí er tað ikki nóg væl grundaðir pástandur tá sagt verður, at samgongan fillar vælferðarføroyar sundur. Veruleikin er, at politiski myndugleikin áhaldandi roynir at finna neyðuga játtanir til øki, har ástendur, hóast trupult er at finna pening, tá milliardin árliga restar í. Tað munnu hóast alt tey flestu fata.

Einvegis at lýsa vælferðarføroyar í fillum út frá stakdømum og at lýsa landsstýrið illviljað er burturvið. Talan er jú um peningin hjá øllum. Hvør króna játtað verður til ymsu endamálini skal rindast av onkrum øðrum. Avbjóðingin er at fáa roknistykkið at ganga upp, so vit ikki missa meira fyri minni.

Tí stríðist landsstýrið fyri at halda fast við vælferðarbatarnar frá 2004 til 08, sum nú kosta landinum útvið 600 mio kr árliga í meirútreiðslum. Tað er nærum ómøgulig uppgáva í hesum krepputíðum. Ein ovurstór avbjóðing.

Politikarar eru noyddir at taka støði í veruliguføroyum í stríðnum at varðveita vælferðarføroyar. Tann sannroynd átti eisini at komið blaðfólkum til hugs, nú ljósið verður varpað á sosialpolitikkin hjá samgonguni.

# Avgreiðið ógoldnu inntøkutrygdina hjá fiskimonnum í stundini!

*Tíðindaskriv*

**Talan er um tilvitað drál frá fiskimálaráðharranum og landsstýrinum, nú peningur restar í til inntøkutrygd hjá fiskimonnum og familjur verða raktar. Málið var kent í landsstýrinum fyri 10 mánaðum síðani og varð reist av andstøðuni á tingi í mai mánaða. Tjóðveldi mælir staðiliga landsstýrissamgonguni og landsstýrismanninum í fiskivinnumálum til í stundini at fáa greiði á hesum máli, soleiðis, at føroyskir fiskimenn kunnu fáa tann pening, sum teir sambært løgtingslógum eiga allan rættin til**

Inntøkutrygd verður goldin við heimild í løgtingslóg no. 112 frá 29. desember í 1998 um minstuløn og dagstudning og løgtingslóg no. 112 frá 13. desember í 2006 um mánaðarligan minstaforvinning til útróðrarmenn. Ongin ivi er harvið um, at útreiðslurnar samsvarandi hesum lógum eru tað, sum vit vanliga rópa fyri lógarbundnar játtanir.

Longu táið løgtingsfíggjarlógin fyri 2009 var í gerð, skrivar fíggjarnevndin í kontutekstinum, eftir upplýsingum frá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, soleiðis: “Mett verður, at nýtslan verður okkurt um 29 mió. kr. í 2009. Hetta er ein hækking á 10,4 mió. kr. í mun til 2008 vegna minni avreiðingarvirði og vaksandi útreiðslur í fiskivinnuni. Tillagingar í skipanini verða gjørdar fyri at halda játtanina uppá 24 mió. kr.

Harvið hevur landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum vitað um nú ákomna trupulleikan í hvussu er síðani fíggjarlógin varð samtykt fyri jól í fjør. Á landsstýrisfundi 16. februar 2009 hevur hann gjørt eina roynd at broyta lógargrundarlagið undir inntøkutrygdini, hansara ætlan var at minka hana við 25-30%´um, men har fekk hann ikki politiska undirtøku fyri hesum. Harvið var greitt fyri øllum, at trot kom í játtanina viðvíkjandi inntøkutrygd seinri í árinum. Hóast hetta ger landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum onki við málið. Heldur ikki táið landsstýrismaðurin í fíggjarmálum leggur eina eykajáttanarlóg fyri tingið 21. apríl 2009 er inntøkutrygdin nevnd við einum stavi. Tjóðveldisumboðini spurdu Lønjavningarstovuna um útgjaldið, og fingu 28. apríl at vita, at 10,6 mió. kr. av teimum játtaðu 24 mió. kr. longu vóru goldnar út, t.v.s., at greitt var longu tá, at játtanin als ikki kom at halda tað ið eftir var av árinum, og at samlaði tørvurin kom at vera á leið 40 mió. kr.

Táið verandi tingseta byrjar á Ólavsvøku kemur heldur ongin umbøn um meirjáttan til inntøkutrygdina, og nú 6 vikur seinri fáa vit brádliga at vita, at landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum hevur steðgað útgjaldingunum vegna trot á játtanini til inntøkutrygd.

Tjóðveldi undrast sáran um framferðina í hesum málinum. Vit kunnu ikki góðtaka, at føroyskir fiskimenn verða hildnir fyri tað turra spott á henda hátt, og átala harðliga niðurgerðingina hjá landsstýrismanninum, um at fiskimenn eru somikið vanir við at bíða eftir sínum hýrum, at hetta eisini man fara at laga seg. Hetta snýr seg um almennar lønir, ásettar samsvarandi løgtingslógum, tí eigur stígur av hesum slagi ikki at koma fyri. Hetta eru javningar, sum í hesum døgum eru lágmarkið fyri at vera til hjá monnum, hvørs inntøka hevur verið í lakara lagi í longri tíð, tí mega vit finnast hvassliga at nonsjalanta stílinum hjá Jacob Vestergaard, táið hann heldur uppá, at tað lítlan og ongan mun fer at gera hjá føroyskum fiskimonnum, um teir ganga lønarleysir í 2-3 mánaðir, ella fram til at ein enn ikki framløgd eykajáttanarlóg, um einar 4-6 vikur, endaliga verður avgreidd frá tinginum.

Politiskt drál og dólskni eru atvoldin til ringa standin. Óskiljandi, at landsstýrismaðurin ikki hevur avgreitt málið við eykajáttanarumbøn, beinanvegin táið honum gjørdist greitt, at tørvurin í fíggjarárinum var farin úr 24 mió. kr. til at vera væl omanfyri 40 mió. kr., ella við einum fíggjarnevndarskjali, táið málið enn kundi metast at vera brádliga ákomið.

**Høgni Hoydal, formaður**
**Tórbjørn Jacobsen, næstformaður**
**Fyri Tjóðveldi**

## Tøkk

Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenslu, tá ið okkara elskaða mamma, vermóðir, omma og langomma

**Minna Sommer Magnusson**
(fødd Isaksen)

doyði og var jarðað.
Tøkk til tykkum, ið ringdu og komu inn á gólvið.
Tøkk til Klaksvíkar Sjúkrahús og Sjúklingaskrivstovuna.
Tøkk til prest, kirkjutænarar, gravarar, sangarar og líkbil.
Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur.
Tøkk til tykkum, sum hjálptu til við ervinum og tøkk til tykkum øllum, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.
Hjartans tøkk øll somul.

*Familjunnar vegna*
**Aðalbjørg, Borgarhjørt, Árni, Bjørn og Bogi við familjum**

## Tøkk

Hjartans takk fyri sýnda samkenslu, tá kæra mamma og mostir okkara

**Anna Petersen**
(Anna hjá John) varð jarðað.

Takk fyri minnisgávur, blómur og kransar.

*Kærar heilsanir*
**Óli, Marita, Sanna, Ingeborg, John og Helena**